Jóannes Ejdesgaard um løgmansrøðuna:

# Samgongan ásannar mistøk

**Andstøðuleiðarin Jóannes Ejdesgaard finnist at ymsum útsøgnum hjá Anfinni Kallsberg í løgmansrøðuni. Sambært Jóannesi Ejdesgaard síggjast í dag negativu avleiðingarnar av niðurskurðinum á blokkstuðulinum, umframt at at ætlanir løgmans á økinum um vinnuligan fiskiskap ikki fáa stuðul frá Javnaðarflokkinum, tá løgtingið í hesum døgum skal umtala fiskidagaskipanina**

*Jóannes Ejdesgaard vísir í viðmerking til løgmansrøðuna á fleiri viðurskifti, Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við*



LØGMANSRØÐAN
*Heini í Skorini*

Jóannes Ejdesgaard, andstøðuleiðari Javnaðarfloksins, vísir fyrst og fremst á, at talan var um eina greiða og konkreta løgmansrøðu, sum varð hildin á ólavsøku. Ivamál vórðu sligin fast, og boðskapirnir vóru greiðir.

– Raðfestingin hjá samgonguni tyktist sambært løgmanni fyrst og fremst vera einar sjálvstøðugar Føroyar, og síðani fór hann yvir til varðveitingina av vælferðarsamfelagnum. Um Javnaðarflokkin hevði sitið við róðrið, hevði talan verið um eina øvugta raðfylgju, har vælferð borgarans kom áðrenn nakað annað, slær Jóannes Ejdesgaard fast.

Leiðari Javnaðarfloksins vísir víðari á, at tað tó var positivt við nøkrum staðfestingum frá løgmanni. M.a. kom til sjóndar, at vinnan ikki fær stuðul úr landskassanum, og hevur hetta mál verið sera nógv frammi seinastu tíðina í sambandi við kreppuna í ali- og rækjuvinnuni.

### Fiskimálaráðið fríari ræsur

Jóannes Ejdesgaard beit eisini merki í orð Anfinn Kallsbergs um greiðari umsitinginarliga lóggávu viðvíkjandi vinnuligum fiskiskapi. Boðskapurin handan hetta er sambært Jóannes, at Fiskimálaráðið skal hava fríari ræsur, har møguleikin verður at flyta loyvi millum veiðibólkar.

– Løgmaður legði upp til, at landsstýrið skal hava fríari spæl viðvíkjandi fiskiloyvum, og fáar dagar undan, at málið um fiskidagar er á skránni í løgtinginum, var eitt ávíst rák at síggja í røðuni, sum m.a. legaliserar málið um Jógvan S, sigur Jóannes Ejdesgaard. Hann vísir víðari á, at Javnaðarflokkurin væntandi ikki verður einasti flokkur, sum mótmælir, at landsstýrið við fríari ræsum kann flyta loyvi millum veiðibólkar.

### Skipanin onga skuld

Løgmaður segði eisini, at hann í stóru politisku málunum hevði eftirlýst eina breiða semju við stórum meiriluta, men at skipanin ikki er nóg góð, og at hon tískil partvís hevur havt skuldina í fleiri av ósemjunum. Hesum finnist Jóannes Ejdesgaard at.

– Skipanin hevur onga skuld í fleiri av teimum ósemjum, vit hava havt, men heldur hevur talan verið um ein sera lítlan politiskan vilja til samarbeiði og semju. Tískil kann eingin geva nakrari skipan skuldina, slær andstøðuleiðarin fast.

### Ásanna mistøk

Løgmaður vísti víðari á, at tá búskaparligi munurin millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini sambært samgonguskjalinum skal vaksa positivt hvørt ár, verður í ár neyðugt við eini skerjing av rakstrarútreiðslunum í landskassanum komandi ár. Jóannes Ejdesgaard leggur hesum viðvíkjandi dent á, at samgongan í dag noyðist at ásanna nøkur mistøk á búskaparliga økinum.

– Sama landsstýrið, sum fyri fáum árum síðani framdi eina skerjing á blokkstuðlinum á umleið 370 mió.kr., noyðist í dag at skerja fíggjarlógina við einum prosenti, og við hesum síggja vit, at avgerðirnar tá hava avleiðingar fyri vælferðina í dag. Formaður Javnaðarfloksins vísir við hesum á, at við niðurgongdini í samlaðu búskaparligu gongdini koma avleiðingarnar nú til sjóndar, har føroyingurin noyðist at gjalda, umframt at kommunurnar væntandi fáa sera tung og kostnaðarmikil øki lagdar á herðar sínar.

Lisbeth L. Petersen um løgmansrøðuna:

# Einki samsvar

**Leiðarin í størsta andstøðuflokkinum, Lisbeth L. Petersen, helt ikki talan vera um nakað nýtt og óvæntað í ólavsøkurøðu løgmans. Umframt hetta vísir hon á, at einki samsvar er millum høgu raðfestingarnar á almannaøkinum og skerjingarnar á komandi fíggjarlóg**

LØGMANSRØÐAN
*Heini í Skorini*

Tá løgmaður trein av aftur talarastólinum fyrrapartin 28. juli, hevði einki nýtt verið at hoyrt, sum ikki fleiri ferðir hevur verið frammi fyrr.

Hetta vóru fyrstu viðmerkingarnar hjá andstøðuleiðaranum Lisbeth L. Petersen, sum vísir á, at talan í størsta mun var um endurtøkur av málum, sum í fleiri ár hava verið ovarlaga á breddanum.

### Ov lítil framgongd

Sambært Lisbeth L. Petersen vóru málini, samgongan hevur sett sær, høvuðseyðkenni fyri røðuna. Málið um pensiónir var enn einaferð frammi, nøkur orð vóru til vinnuna, Grundlógin varð umtala, meðan Kyoto sáttmálin eisini var uppi at venda. Somu mál tykjast ganga aftur, og Lisbeth L. Petersen vísir á, at hetta kann bera boð um, at ferð ikki kemur á ætlanirnar.

– Tað, at somu mál eru afturvendandi, kann vera eitt boð um, at ov lítið hendir á hesum økjum. Í fleiri ár hevur talan bert verið um ætlanir og orð, sum ikki verða førd út í lívið, sigur Lisbeth L. Petersen, sum leggur afturat, at spurningurin er, hvussu leingi ein kann halda á við hesi gongd.

### Almannamál høga raðfesting

Anfinn Kallsberg gav eisini rúm fyri skúlamálum, heilsumálum og almannamálum annars, og hetta var sambært Lisbeth L. Petersen ein dygd og styrki við røðuni.

– Tað var gott at hoyra, at hesi mál tyktust hava høga raðfesting, tí hetta eru grundleggjandi og týdningarmikil øki. Samstundis er talan um sera kostnaðarmikil mál, sum í framtíðini kunnu volda trupulleikar, tí um hesi mál skulu raðfestast høgt, umframt at fíggjarlógin skal skerjast, verður talan um ósamsvar og tvørsøgnir.

### Ørkymlaðar kommunur

Við hesum sipar leiðarin í størsta andstøðuflokkinum til, at við høgari raðfesting av hesum kostnaðarmiklu almannamálum verður sera torført at skerja fíggjarlógina 1% komandi ár, sum ætlanin er. Tískil kann talan enn einaferð gerast um ætlanir, sum ikki gerast til nakað, umframt at kommunurnar fáa alsamt fleiri byrðar lagdar á seg.



*Lisbeth L. Petersen helt ikki, at samsvar er í ætlanunum hjá samgonguni*

– Alt bendir á, at kommunurnar fáa fleiri og fleiri kostnaðarmiklar byrðar at bera, sum landsstýrið ikki skal gjalda í framtíðini, og tað kemur einstaki borgarin at gjalda við hægri kommunuskatti. Kommunurnar í dag eru ikki sørt ørkymlaðar, tí ógreitt er, hvørji øki verða løgd á kommunurnar í framtíðini.

### Ongar veruligar sparingar

Við hesum vísir Lisbeth L. Petersen á, at talan í veruleikanum ikki er um nakrar sparingar, men heldur um stórar útreiðslur, sum bert verða fluttar úr einum øki í annað.

– Samgongan tosar um sparingar við at skerja fíggjarlógina við einum prosenti, men tá hesar útreiðslur verða koyrdar út til kommunurnar, er talan sjálvsagt ikki um nakrar veruligar sparingar, og tískil hanga ætlanirnar ikki saman, sigur Lisbeth L. Petersen at enda.



# Yvirtøkur í niðurgongutíðum

**Nógvar yvirtøkur eru á skránni hjá landsstýrinum, hóast hann dregur hann á luftina fíggjarliga, og tí fer tað at síggjast aftur á komandi fíggjarlóg, at táttað verður í. Tað førdi Anfinn Kallsberg fram í ólavsøkurøðu sínari**

LØGMANSRØÐA
*Ingi Rasmussen*

»Fremsta mál landsstýrisins er framvegis at skapa karmar um eitt sjálvbjargið samfelag, so at fólkið uttan fíggjarligar forðingar og umsitingarligar bindingar kann taka avgerð um framtíðarstøðu Føroya.«

Við hesum inngangsorðum byrjaði Anfinn Kallsberg løgmansrøðuna, tá tingsetan 2003 varð sett í løgtinginum ólavsøkudag. Sostatt gjørdi løgmaður greitt, at hóast málini eru nakað kámað, síðan samráðingarnar um fullveldi kollsigldu, so er sjálvstýrispolitikkurin framvegis ovarlaga á dagsskránni í føroyskum politikki.

Í løglistanum og ískoytinum, sum Anfinn Kallsberg hevur handað tingmonnum afturvið røðuni, sæst eisini, at øll aðalráðini arbeiða við yvirtøkum, sum skulu fremjast í næstum. Ein týðandi táttur í yvirtøkuætlanini er yvirtøkulógin, sum Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen samdust um í Suðuroy, tá forsætisráðharrin vitjaði Føroyar.

– Við hesi yvirtøkulóg og heimastýrislógini kunnu vit taka yvir øll málsøki undantikin tey, ið knýta seg beinleiðis at fullveldinum. Hini málsøkini koma undir føroyskt ræði, tá ið yvirtøkulógin fær gildi, ella tá ið føroyski myndugleikin avger tað. Tá ið yvirtøkulógin er komin í gildi, stendur tað til føroyska myndugleikan at gera av, hvussu skjót sjálvstýristilgongdin skal verða, segði Anfinn Kallsberg.

Fyrireikað verður at taka yvir øll øki, teirra millum løgreglu, rættarskipan, revsirætt, útlendingarætt, fíggjarrætt, persóns-, familju- og arvarætt, tilbúgving, fólkakirkju og flogferðslu.

### Dregur á luftina

Hetta hendir samstundis, sum hann dregur á luftina fíggjarliga.

Stóri búskaparvøksturin seinastu árini er steðgaður á, staðfesti løgmaður. Í ár verður vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni væntandi umleið 3,6 prosent. Í fjør var vøksturin 9,5 prosent. Eins og fjør væntast avlop á handilsjavnanum, tá skip ikki eru tald við, men avlopið verður væl minni enn í fjør. Fleiri vinnur eru í álvarsligari kreppu, ásannaði løgmaður.



*Vit kunnu vænta væl minni búskaparvøkstur næstu árini, og tí vera krøvini til komandi fíggjarlóg, at útreiðslurnar vaksa ikki meira enn inntøkurnar, segði Anfinn Kallsberg í sínari røðu, tá tingið varð sett ólavsøkudag.*

*Mynd: Jens K. Vang*

– Minni búskaparvøkstur og soleiðis minni keypiorka í okkara marknaðarlondum, størri útboð enn eftirspurningur millum annað á rækjum og laksi og fallandi marknaðarprísir sum heild gera, at vit hava minni lønsemi í okkara útflutningsvinnu nú. Fyri rækjuflotan og alivinnuna er hetta eitt álvarsligt bakkast. Landsstýrið roynir tí at skapa so góðar karmar um vinnuna sum gjørligt, men beinleiðis at stuðla vinnuni kemur ikki upp á tal, segði Anfinn Kallsberg, sum samstundis viðgekk, at nakrar fyritøkur hóra ikki undan og mugu gevast.

### Nýtslan tálmað

Løgmaður ásannaði, at landsstýrið hevur sett sær stór og víðfevnd mál, men í samgonguskjalinum er eisini avtalað, at búskaparligi munurin millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini skal vaksa á hvørjum ári. Tí er semja um í landsstýrinum, at rakstrarútreiðslur landskassans verða eitt prosent lægri í 2004 enn í ár, eins og semja er um at gera samsvarandi lógarbroytingar og dagføra almennu umsitingina.

– Skulu vit halda hesa avtalu samgongunnar – og tað skulu vit – verður neyðugt at gera tillagingar í almennu nýtsluni, so at útreiðslur landskassans verða lagaðar til inntøkurnar. Hetta er fyritreytin fyri at røkka málinum um ein sjálvberandi búskap. Vit kunnu vænta væl minni búskaparvøkstur næstu árini, og tí vera krøvini til komandi fíggjarlóg, at útreiðslurnar vaksa ikki meira enn inntøkurnar, segði Anfinn Kallsberg.

Í ólavsøkurøðuni vóru nógv mál umrødd, sum samgongan fer at arbeiða við næsta og komandi árini. Á listanum yvir mál, sum verða løgd fram hesa tingsetuna, eru 84 lógaruppskot og frágreiðingar.

# Skúlar skulu smíðast

**Landsstýrið er samt um at raðfesta íløgur í skúlabygging, og innan skúlagátt verða ábøtur gjørdar, segði Anfinn Kallsberg løgmaður í ólavsøkurøðu sínari**

LØGMANSRØÐA
*Ingi Rasmussen*

Skúlabygging er sett í fremstu røð hjá landsstýrinum, sæst av fleiri verklagslógum, sum verða lagdar fyri tingið í ár.

Talan er um fýra nýggjar skúlar og skúlaútbyggingar, ið skulu fremjast næstu árini, og farið verður at grava út og byggja Miðnámsskúlan í Suðuroy longu í ár.

Arbeiðið heldur fram at fyrireika bygging av nýggjum Fiskivinnuskúla við sjódepli í Vestmanna og at fyrireika útbygging av Tekniska skúla í Klaksvík. Farið verður eisini undir at fyrireika bygging av Listaskúla í Sandoynni, og eftir ætlan verður farið at byggja allar hesar skúlar í 2004.

Ein verklagslóg at byggja skúladepil við Marknagil verður løgd fyri Løgtingið í heyst. Ein bygginevnd, har skúlarnir, ið eru partar í byggiætlanini, eru umboðaðir, er longu sett frammanundan.

– Okkara skúlaskipan er nógv tillagað skipanum uttaneftir. Nú skal undirvísingarskipanin verða gjørd so, at hon meira enn fyrr byggir á okkara egna samfelag, segði Anfinn Kallsberg løgmaður.

Í fólkaskúlanum verður arbeitt við ætlan, sum leggur serligan dent á byrjanarundirvísing, næmingar við serligum tørvi, trivnað í fólkaskúlanum og næmingar, ið hava atferðartrupulleikar. Harumframt verður arbeitt við ætlan, har øll fáa atgongd til útbúgving eftir fólkaskúla. Eitt nú er ætlanin at gera yrkisskeiðini betri.

Arbeiðið at endurskoða lærara- og pedagogútbúgvingina er eisini farið í gongd.

# Óbúgvin politisk skipan

**Politikarar fingu eina oyrafiku, tá Anfinn Kallsberg setti tingið ólavsøkudag. Politiska skipanin er ikki búgvin til samstarv, segði løgmaður, sum í somu vending átók sær sín part av ábyrgdini fyri, at tað hevur gingist so illa at finna breiðar politiskar semjur**

LØGMANSRØÐA
*Ingi Rasmussen*

Breið semja.

Tað hava verið lyklaorðini, síðan Anfinn Kallsberg tók um stýrisvølin og gjørdist løgmaður í 1998. Orðini hava serliga verið havd á lofti í sjálvstýrismálinum, sum hevur verið ovast á breddanum hesi árini, men eisini í øðrum høpi hevur løgmaður dyrgt eftir at fáa eina breiða semju um stór politisk mál.

Hetta er ein politiskur arbeiðsháttur, sum er vanligur aðrastaðni. Stórur dentur verður lagdur á at fáa politisku andstøðuna við í týðandi avgerðir, so tjóðin stendur samlað um stórmál. Afturfyri sleppur andstøðan so at seta síni fingramerki á politikkin, men tað hevur verið so sum so, hvussu hetta hevur hepnast í Føroyum.

– Hóast eg havi roynt at fáa breiða politiska undirtøku í málum, ið sum frálíður hava stóran týdning fyri samfelagið, má ásannast, at hetta hevur ikki eydnast serliga væl. Eg havi helst mín part av skylduni, men staðfestast má, at politiska skipanin enn ikki er búgvin til eitt slíkt samstarv, segði Anfinn Kallsberg í løgmansrøðuni.

Hóast tað tóktist, sum løgmaður gav skarvin yvir, so segði hann seg enn hava vónina. Men fortreytin er, at føroyskir politikarar taka annað skinn um bak.

– Tað er mín vón, at tíðin fer at arbeiða fyri hesum. Tí stórmál liggja fyri framman at loysa. Eg vóni, at vit kunnu leggja til viks øll persónlig áhugamál og taktiskar politiskar neisir fyri saman at fremja grundleggjandi lóggávu, sum røkkur langt inn í framtíðina, landi og fólk okkara at gagni, segði Anfinn Kallsberg.